## HEILSANIR




**Allarbesti abbin**
Mamma og eg ynskja tær hjartaliga tillukku á tínum 60 ára degi. Takk fyri at tú elskar okkum so høgt. Sært tú abban! Her eru bert nakrar fáar hugnaløtur, vit hava havt, meðan eg búði í DK. Gleði meg til allar tær vit fáa, nú eg búgvi í Føroyum.
**Klem frá Emil**




**Góða Sunneva**
Hjartaliga tillukku á 40 ára degnum. Tað er ótrúligt, sum tú heldur tær væl, tí ikki sæst aldur á.
**Heilsan loppurnar**



**Góða Sunneva**
Hetta var ein ógloymandi túrur - bæði so og so. Tillukku við teimum 40 árunum.
**Heilsan bindiklubburin**




Hesir báðir senda abbanum í Sumba allar bestu tankar á hansara 60 ára føðingardegi. Omman fær eisini eina góða heilsan.
**Stefan og Emil**



**Malan og Poul Eli**
Góðu foreldur og verforeldur
Í dag hava hesi bæði verið gift í 50 ár. Her eru tey ung og pen. Pen eru tey enn, men tó nakað eldri. Hjartaliga tillukku og harrans signing í framtíðini.
**Børn og svigarbørn**



**Góða Sunneva**
Í 1976 varð hendan myndin tikin. Hvør skuldi trúð at tú nú verður 40 ár?
**Heilsan hinar tú veit**




**Malan og Poul Eli**
Góðu omman og abbin
Hjartaliga tillukku við tykkara stóra degi. Takk fyri at tit eru so góð við okkum. Góðan túr til Ebeltoft.
**Kærar heilsanir vit øll tykkara ommu- og abbabørn**



Smartar brillur og grøna ulpu - tað vóru tíðir. Tillukku, tillukku.
**Sosialurin**



**Góða fitta Ritva**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum í dag.
**Ynskja omma og abbi í Søldarfirði**



**Góði Sonny**
Hjartaliga tillukku við teim 14 árunum 18. sept. Jesus signi framtíð tína.
**Heilsan mamma, babba, Súna, Ása og Marý**



**Hej smukke**
Ja, her er nógv vatn runnið í ánna, síðan hendan myndin var tikin. Hjartaliga tillukku á 33 ára degnum. Ynskja vit øll her inni.
**Kristina**



**Páll Beder**
Góði Páll. Hjartaliga tillukku á føðingardegnum 19. sept. Ótrúligt tú sært gott út. Nú tú blívur 1/2 hundrað. Vónandi fær tú ein góðan dag.
**Kærar heilsur árg. 55**



**Góða Marita-omma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 19. sept. Takk fyri alt tú ert fyri meg. Eg elski teg.
**Heilsan Marita**



**Góða gamla Sjúrðargøta 9**
Tað vóru dagar!! Tillukku við 30 ára starvsdegnum.
**Ynskja vit, sum vóru í Sjúrðargøtu**






Skeiðsdepilin
FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

Málskeið í føroyskum og enskum

Føroyskt mállæra og rættskriving
15 tímar, hósdagar frá 23. okt. til 20. nov. kl. 15.30-18.15

Innihald
- málsøga - ljóðlæra
- bendingarlæra - orðalagslæra
- tekniseting - stórur stavur og lítil
- rættskrivingarreglur - gott og vánaligt mál

Føroyskt fyri útlendingar
36 tímar, mánadagar frá 20. okt. til 19. jan. kl. 16.15-19.15

Innihald
- vant verður í talumáli
- lættari tekstir verða lisnir
- grundreglur í føroyskari mállæru

Business English
24 tímar, hósdagar frá 9. okt. til 6. des. kl. 15.00-17.30

Innihald
- duga at orða teg og svara spurningum á enskum
- duga at nøkta serstakan tørv hjá kundum/fáast við truplar kundar
- gera fundaravtalur, gera ein bókling, ið lýsir tína vøru o.s.fr.

Telephone Service
8 tímar, mikudagar frá 22. til 29. okt. kl. 16.00-20.00

Innihald
- presentera teg og títt arbeiðspláss
- seta innkomandi samrøður ígjøgnum - svara spurningum
- biðja um meira kunning - gera avtalur/fundaravtalur
- "Small talk" og týdningur tess.

Lesið meira um skeiðini á okkara heimasíðu www.skeidsdepilin. fo. har kanst tú eisini tekna teg til skeiðið.

Tilmelding: Í seinasta lagi 1 viku áðrenn skeiðsbyrjan
Skeiðini verða hildin treytað av, at nóg nógvir luttakarar tekna seg.

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn,
Tel 318813, Fax 313374




Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

